# Meira enn 200 til oljuráðstevnu

OLJURÁÐSTEVNA
*Jan Müller*

Meiri enn 200 fólk hava teknað seg til oljuráðstevnuna, sum verður hildin í Norðurlandahúsinum allan mikudagin. Hetta er 3. ferð, at Oljuvinnufelagið undir Vinnuhúsinum skipar fyri slíkari ráðstevnu, sum helst fer at verða fastur táttur hesa ársins tíð, soleingi leitað verður eftir kolvetnum á landgrunnum og útlit eru fyri oljufundum og fylgjandi framleiðslu. Av tí at lítið virksemi hevur verið á landgrunninum í eina tíð og tí bert ein brunnur skal borast næsta ár er avgjørt, at ráðstevnan bert skal vara í ein dag. Skráin er tó bæði fjølbroytt og áhugaverd.

**OFFSHORE FAROES 2002**

Ráðstevnan byrjar klokkan 9:00 við nøkrum orðum frá Eyðun Elttør, landsstýrismaður í oljumálum.

Nógv ymiskt er á skránni. Millum annað fara øll oljufyristøðufeløgini í Føroyum at gera status.



*Frá oljuráðstevnuni í Norðurlandahúsinum í fjør.*

Serliga áhugavert verður at hoyra, hvat Agip fer at siga. Tað verður bara ein brunnur boraður næsta ár, og tað er Agip, sum stendur fyri honum.

Í sambandi við oljuráðstevnuna koma eisini umboð fyri Dolphin Drilling til Føroya. Dolphin Drilling er felagið, sum Agip hevur gjørt sáttmála við, um at bora brunnin næsta ár. Iain Mitchell, Senior Vice President Marketing, fer at umboða Dolpin Drilling á ráðstevnuni.

Martin Heinesen, stjóri á Jarðfrøðissavninum, fer at greiða frá, hvussu gongst við menningini at sleppa ígjøgnum basaltið. Bæði tá tað kemur til at skjóta seismikk og tá tað kemur til at bora ígjøgnum basalt. Lars Bæksgaard, formaður í Sindri, fer eisini at geva ein status, millum annað av boringini í Glyvursnesi. Og til síðst í hesum partinum, fer Herálvur Joensen, aðalstjóri í Oljumálaráðnum, at siga nøkur orð um næstu útbjóðingarrundu.

Seinnapartin verður sett fokus á risastóra norksa LNG-gass projektið í Norðurnoregi. Snøvit. Eisini fara vit at hoyra nakað um føroysku royndirnar at gerast partur av oljumenningini í útlandinum. Har fara m.a. Wilhelm Petersen frá Atlants Kolvetni og Magni Arge frá Oljuvinnufelagnum at leggja fyri.

# Oljufeløg seta 2003 út í kortið

OLJA
*Jan Müller*

Tey 14 oljufeløgini, sum eru við í leitingini eftir kolvetni á føroyska landgrunninum, høvdu fund á Hotel Føroyum í gjár. Feløgini, sum hava skipað seg í eitt áhugafelag, FOIB, viðgjørdu arbeiðsprogrammið fyri næsta ár og budgettið. Ben Arabo, stjóri í Amerada Hess og formaður í felagnum, sigur, at feløgini samstarva, har tey hava felags áhugamál. Spurningar, sum verða raðfestir høg, eru vísindaligar kanningar m.a. í sambandi við leiting á føroyska landgrunninum, og tað eru mál, sum viðvíkja umhvørvi, trygd og jarðfrøði. Í FOIB eru so fimm ymiskir undirbólkar, sum taka sær av teimum ymsu økjunum. Felagsskapurin er avloysari hjá GEM, sum upprunaliga varð stovnað til burturav at taka sær av umhvørvisspurningum. Tað er tó framvegis ein týðandi partur av arbeiðinum hjá FOIB. Fundurin er lagdur í Havn í sambandi við, at Oljuvinnufelagið undir Vinnuhúsinum skipar fyri oljuráðstevnu í Norðurlandahúsinum í dag.



*Umboð fyri tey 14 feløgini í FOIB, sum er felags andlitið hjá oljufeløgunum úteftir, hittust í gjár á fundi í Havn.*

*Mynd Jens K Vang*



# Munur á

## Samanbering av útboðum av fylgisveinarásum

SJÓNVARP
*Heri á Rógvi*

Nú Televarið byrjar at senda í vikuni fer hetta at merkja kapping á marknaðinum fyri fylgisveinarásir.

Vit fara her at gera ein lítla samanbering millum tveir av útbjóðarunum – Canal Digital og so Televarpið.

Canal Digital, ið norska Telenor eigur, bjóðar fylgisveinarásir til føroyingar. Seinni árini er Canal Digital vorðið ómetaliga væl umtókt í Føroyum, og kundatalið hjá teimum skal vera fleiri túsund, hóast hetta talið ikki er váttað nakrastaðni.

Televarpið fer uttan iva at geva Canal Digital ein skarpan gang í kappingini.

Hóast útboðini hjá Canal Digital og Televarpið líkjast, so eru fleiri munir á. Eitt nú er talan partvíst um heilt øðrvísi útgerð, ið skal til.

Vit hyggja eitt sindur nærri at.

### Rásirnar

Sum nevnt í grein fyri nøkrum vikum síðani er útboðið av rásum hjá Canal Digital og Televarpinum rættiliga líkt.

Munurin er serliga tann, at kapasiteturin hjá Canal Digital er væl størri enn tann hjá Televarpinum.

Við verandi bandbreidd kann Televarpið illa seta nakra rás afturat, uttan so at ein verður tikin burtur. Hóast Televarpið í framtíðini sigur seg fara at arbeiða framímóti betringum á hesum økinum, so taka vit støði í verandi støðu.

Skoða vit einans eftir talinum av rásum, so slær Canal Digital Televarpið í gólvið.

Kapasiteturin hjá Televarpinum er í løtuni so væl nýttur, at pláss higartil ikki hevur verið fyri útvarpsrásum, sum einans krevja at brotpart av tí bandbreidd, ið skal til sjónvarp.

Útvarpsrásir eigur Canal Digital einar tjúgu av, um tú altso hevur hug at rinda fyri tær.

Men sum nevnt, útboðið líkist sær hjá báðum.

Báðir veitararnir hava eitt útboð av undirhalds, films, barna, tíðindarásum osfr.

Televarpið hevur God Channel afturat í mun til Canal Digital. Umframt hevur Televarpið eisini SvF og sína Info rás, sum fer at eita Rás 1.

Canal Digital hevur rásir sum eitt nú TV2 Zulu, DK4 Nickelodeon umframt aðrar.

Hjá báðum útbjóðarum verða rásirnr bjóðaðar í pakkum. Pakkarnir eru eisini sum vera mann sera meinlíkir.

Samanbera vit pakkarnar family hjá Canal Digital og Televarpspakkan hjá Televarpinum, sum kunnu metast sum eitt slag av grundpakka, síggja vit, at innihaldið líkist sera nógv. Munurin er onkur donsk rás, onkur og okkurt, sum bert verður sent seint á kvøldið. Eisini hava teir Pay Per View møguleikar.

Báðir útbjóðararnir hava ein pakka, har teir leggja Canal+ afturat. Har hevur Canal Digital eina rás fleiri. Canal+ Zap, sum bert sendir alternativa ítróttardystir fáar tímar um vikuna, telist eisini millum rásirnar hjá Canal Digital.

Canal Digtal hevur umframt nakrar rásir afturat. Síggja vit burtur frá DR, hevur Televarpið eina rás, MUTV – Manchester United Television, sum eyka rás. Hon er við í stóra pakkanum hjá Canal Digital, Entertain.

Canal Digital hevur so eisini aðrar rásir, har gjaldast skal fyri hvørja sær. Munurin er so eisini tann, at Canal Digital so við og við oftani kemur við nýggjum tilboðum ella rásum, og tær taka eisini burturúr av og á.

### Prísir og ársgjald

Fyri at vera kundi hjá Televarpinum skalt tú gjalda 150 kr. tvær ferðir um árið fyri leigu av korti. Ì alt 300 kr. Hetta sama gjald er 390 kr. hjá Canal Digital.

Í skrivandi stund eru allir prísirnir hjá Televarpinum ikki vorðnir greiðir. Tað er heldur vist, at DR1 og DR2 vera við frá byrjan.

Sum tað sæst aðrastaðni á síðuni er munur á prísunum.

Annars nýta bæði Televarpið og Canal Digital sjálvvirkandi skipanir til gjaldingar.

Ein pakki er eisini hjá Canal Digital, ið kallast lokal. Hann inniheldur danskar rásir. Hesin pakkin er fyri so vítt ókeypis, men føroyingur mugu gjalda 2.062 kr. árliga fyri at síggja DR1 og DR2. Velur tú bara pakkan lokal, so skalt tú eisini av við eitt munandi størri ársgjald.

Televarpið samráðist í løtuni við DR um lagaligari prísir enn teir, ið Canal Digital hevur fingið.

Skal mann trúgva Canal Digital, fara teir eisini at kunna bjóða lægri prísir, um Televarpið fær loyvi til tess.

Canal Digital kemur avsláttur til føroyskar, tí móttøkuviðurskiftini eru so mikið vánalig í Føroyum, at tað krevur rímiliga dýra útgerð, um tað skalt síggja alt.

Eftir hvat skilst nýtir nógvir føroyingar tann møguleikan at skráseta seg í Danmark á ein ella annan hátt og á henda hátt fáa DR so gott sum ókeypis. Havast skal í huga, at ert tú skrásetur sum kundi í Danmark, so mást tú eisini gjalda fullan prís, og tú fært ikki føroyska avslátturin. Ivasamt er tó, um hetta er so reiðiligt at gera.

### Útgerð

Tann største munin hjá báðum útbjóðarunum finna vit í útgerðini. Her eigur Televarpið ein stóran fyrimun.

Fylgisveinarnir hjá Canal Digital standa soleiðis, at tað er sera trupult at síggja allar rásirnar í Føroyum.

Eftir hvat vit hava fingið upplýst, er neyðugt við einari skál við 2 metur tvørmáti, um tú skalt síggja allar rásirnar. Ein sovorðin kostar eitt stað millum 5 og 6.000 kr. Skálirnar, ið oftast verða seldar í tilboðunum frá Canal Digital, kosta 1.000-1.200 kr. og eru 1m í tvørmát.

Av hesi somu orsøk hevur Canal Digital givið føroyskum kundum avsláttur.

Hjá Televarpið skalt tú eisini hava eina anntennu. Talan er um eina UHF anntennu, ið nógv húski nýta – kanska mest í høvuðsstaðnum.

Talgildir móttakara skulu í báðum førum nýtast, og kostnaðurin fyri hendan hjá Televarpinum er vegleiðandi 2.195 kr. Hjá Canal Digital kann prísurin svinga rættiliga nógv, tí útboðið er breitt.

Skalt tú keypa tær útgerð at taka Canal Digital niður við, skalt tú eisini keypa káplar og annað, sum geva ein meirkostnað.

Hinvegin kanst tú venda tí á høvdið og siga, at hevur tú longu keypt tær parabol útgerð, so skalt tú av við umleið. 4.000 kr. afturat fyri at síggja allar rásirnar hjá Canal Digital í mun til Televarpið.

### Í alt

Samanumtikið fara vit ikki her at gera nakra niðurstøðu fyri nakran. Enn er Televarpið so mikið nýtt og lítið útbreitt, at samanberingsgrundarlagið bara er viðkomandi fyri ein part av føroyingum. Fólk eiga kanska longu útgerð til Canal Digital ella eiga fólk útgerð, sum við einum móttakara kann setat til Televarpið. Tað kann vera so ymiskt.

Greitt er, at Canal Digital eigur fleiri rásir, men tað krevur oftast størri útgerð, skalt tú síggja allar hesar.

Í øllum førum er talan um tveir útbjóðarar, sum hava sett sær fyri at kappast, og teir at koma brúkarunum til góðar.



*Eins og fjarstýringini á sjónvarpinum snýr tað seg um at velja í hesum døgum.*
*Mynd: Jens Kristian Vang.*

## Rásirnar hjá Televarpinum

Televarpspakkin
(179 kr./mánaðin):
- BBC World
- BBC Prime
- CNN
- TCM/Cartoon Network (felagsrás)
- TvDanmark 1
- TvDanmark 2
- Discovery
- Animal Planet
- CNBC Nordic / National Geographic Ch. (felagsrás)
- Fox Kids/Hallmark (felagsrás)
- Eurosport
- Eurosport News
- VH1
- VH1 Classic
- MTV
- God Channel
- SvF
- Info

Pakki við DR:
- DR 1
- DR 2

Pakki við Canal+ :
- Canal+
- Canal+ Gul
- Canal+ Blå

Pakki við MUTV(50 kr./mðn):
- MUTV

## Rásirnar hjá Canal Digital

Entertain
(299 kr./mánaðin):*
- Adult
- Animal Planet
- BBC Prime
- BBC World
- CANAL+
- CANAL+ BLÅ
- CANAL+ GUL
- CANAL+ ZAP
- Cartoon Network
- CNBC Nordic
- CNN International
- DanToto
- Discovery Channel
- dk4
- DR1(Eykagjald í Føroyum fyri DR 2.062 kr. um árið)
- DR2
- E!
- Eurosport
- Eurosport News
- Fox Kids
- Hallmark
- KIOSK (Pay Per View)
- MTV Nordic
- Music Choice (umleið 20 útvarpsrásir)
- MUTV
- National Geographic
- Nickelodeon
- Radio 2
- Sky News
- Travel Channel
- TCM
- TV 2 Zulu
- TvDanmark 1
- TvDanmark 2
- VH1
- VH1 Classic

Adventure pakki
(69 kr./mðn.)*
- Adventure 1
- Discovery Sci-Trek
- Discovery Civilisation
- Discovery Travel & Adventure.

Aðrar rásir
(Gjaldast hvør sær)*
- Private Gold
- TV Finland

*Fyri at síggja allar rásirnar krevst oftast stór móttakaraskál. Avsláttur verður givin til føroyskar kundar – líkamikið útgerð.